# Botndystur á Mølini

**Tvøramenn hava leita styrk uttanlands, og EB/Streymur ætlar sær øll stigini**

UPPTAKT
*Páll Holm Johannesen*

Sunnudagin fær felagsliðið EB/Streymur vitjan av tvøramonnum á Mølini. Dysturin verður ein sokallaður seks stigs dystur, har úrslitið kann fáa stóran týdning fyri botnstríðið í ár. Kappingin er við at býta seg upp í ein odd, eina miðju og ein botn. Botnin mynda Skála, TB og EB/Streymur, og innanhýsis dystirnir millum hesi følgini eru rættiliga týdningarmiklir fyri, hvat fyri lið skal tungu leiðina niður í aðru deild.


*EB/Streymur kann við einum sigri á TB, leggja sjógv ímillum seg og botnliðini*

### Allir mans tøkir hjá EB/Streymi

Frá felagsliðnum verður boða frá, at allir mans eru tøkir undan dystinum og leikararnir eru rættiliga uppsettir til dystin ímóti TB. - Vit hava spælt tríggjar dystir fyrr í ár ímóti teimum, og allar dystirnar, hava vit verið betra liðið, verður sagt frá av sundalagnum. Sundalagsmenn taka eisini undir við, at dysturin er av alstórum týðningi fyri bæði liðini, og hann kann koma at hava stóran týding fyri botnstríðið í ár. - Trýstið liggur á tvøramonnum, tí vit eru tvey stig frammanfyri, og teir skulu helst vinna dystin, greiða sundalagsmenn frá undan dystinum. Teir vísa eisini á týdningin at vinna dystin, tí sum sundalagsmenn greiða frá, so hava teir eitt rættiliga ungt lið, og fyri at teir ungu kunna fáa neyðugu royndirnar, má EB/Streymur varveita sessin í fyrstu deild. Við einum sigri á tvøramonnum leggur EB/-Streymur sjógv ímillum seg og TB, og tá sær rættiliga bjart út hjá sundalagsmonnum, viðvíkjandi sessinum í bestu deildini.

### Spenningur á Tvøroyri

Undan dystinum á Mølini sunnudagin eru tvøramenn rættiliga spentir um, hvussu fer at hilnast. Í vikuni hevur ein onglendingur, við navninum Craig Dean, royndarvant. Hann hevur klára seg somikið væl, at hann við vissu verður við á TB-liðinum sunnudagin. Craig Dean er 26 ára gamal miðvallari, og ætlanin er at hann skal stýra TB-miðvøllinum. Aftrat Craig Dean, arbeiða tvøramenn harðliga við at styrkja enn meir um liðið til sunnudagin. Tveir danir eru í kikaranum, men tað bleiv ikki greitt fyrr enn seint fríggjadagin, um teir verða við ímóti EB/Streymi. Wladimir Matijivic og Óli Johannesen vera báðir við aftur, eftir at teir sótu uttanfyri ímóti HB seinasta vikuskiftið.Einastu spælarar, ið sita uttanfyri, eru Andrass Nolsøe og Nebosje Urtajl, ið er báðir eru skaddir.

Tvøramenn vænta ein torføran dyst ímóti felagsliðnum, ið teir siga, altíð eru torførir at møta á Mølini. -Teir skapa sjáldan meir enn 2-3 møguleikar í einum dysti, og tað plagar at vera nóg mikið hjá teimum at gera mál uppá, verður sagt av Tvøroyri.

Annars eru tvøramenn rættiliga bjartskygdir undan dystinum, tí nú tykist nakað at henda í felagnum, og komandi vikurnar vænta teir, at hópurin verður somikið styrktur, at liðið ikki noyðist niður í aðru deild.

# Bæði liðini fara eftir sigrinum

**Tað gongur framá hjá báðum liðum á stigatalvuni, so nú ræður um hjá vágbingum og gøtumonnum at halda tørn**

UPPTAKT
*Páll Holm Johannesen*

Tá VB og GÍ møtast á Eiðinum sunnudagin, verður talan um tvey lið, ið eru vælkoyrandi í løtuni. VB hevur í tveimum torførum dystum fingið fýra stig, meðan gøtumenn hava fingið fulla úrtøku úr tveimum teimum seinastu dystunum. Eftir sigurin á B36 seinasta vikuskiftið, kunnu vágbingar við sigri sunnudagin, blanda seg í kappingina um heiðursmerkir. Skulu gøtumenn fylgja við í oddinum, er kravið trý stig sunnudagin, so tað er lagt upp til ein rættiliga spennandi dyst í Vági.

### VB bjartskygdir

Allir spælararnir eru tøkir hjá VB til dystin sunnudagin. Einasta undantakið er framherjin Nenad Zivanovic, ið er leikbannaður. Hjá VB ræður nú um at halda tørn, nú vágbingar teir seinastu dystirnar hava vent gongdini. Úr Vági verður sagt, at teir altíð fara eftir trimum stigum á heimavølli, og dysturin ímóti GÍ sunnudagin verður onki undantak.- Vit eru í einari góðari stimu í løtuni, og nú er bara ein vegur á stigatalvuni- uppeftir. Venjingarnar ganga væl, og menn er bjartskygdir um seinnu hálvu, greiða vágbingarnir frá.

### Bartal skaddur

Álitið í GÍ-verjuni, Bartal Eliassen, meiddi seg so illa undir venjing týskvøldið, at hann nú gongur á høkjum, og verður ikki við gøtumonnum sunnudagin. Umframt Bartal, er Hans Pauli Petersen leikbannaður. Úr Gøtu verður sagt, at tað gongur betri nú, og skulu teir klára at fylgja við HB, so skulu teir fáa trý stig við sær sunnudagin. Seinasta vikuskiftið vóru bæði Magni Jarnskor og Janik leikbannaðir, men teir verða so við hesuferð. Væntandi er, at báðir vera við frá fyrsta bríksli, so er bara spurningurin um, hvussu Johan Nielsen velur at blanda kortini - Hóast vøllurin í Vági ikki er av teimum bestu, plaga vit at standa okkum væl í Vági, og vónirnar eru tí góðar til dystin, verður sagt úr Gøtu.


*Bæði VB og GÍ ætla sær fulla úrtøku sunnudagin*

# Johan Byrial kundi spælt kortini

**Søgan um skiftið hjá Johan Byrial Hansen til TB heldur fram, tí í vikuni kom fram, at tvøramenn høvdu hald í síni søk**

SPÆLARASKIFTIÐ
*Páll Holm Johannesen*

Tað hevur verið rættiligt rok í DBU í vikuni. Lógin, ið forðaði Johan Byrial Hansen at vera á TB-liðinum seinasta vikuskiftið, er ikki komin í gildið enn. Lógin snýr seg um, at spælari ikki kann skifta felag í Danamark meir enn tvær reisur í einum kappingarárið, og var tað júst hetta, ið forðaði Johan Byrial at skifta til TB.

Tvøramenn vístu sína ónøgd yvir, at lógin ikki er á skrift nakrastaðni, og mánadagin komu so boð úr DBU um, at lógin ikki kemur í gildið fyrr enn í september í ár. Tað hevði so havt við sær, at Johan Byrial Hansen kundi havt tørna út fyri TB seinasta vikuskiftið.

Sum nevnt aðrastaðni í blaðnum, arbeiða tvøramenn uppá at fáa styrk úr Danmark til dystin ímóti EB/Streymi, og um Johan Byrial Hansen er ímillum teirra, vilja tvøramenn hvørki játta ella avsanna.


*Stóri spurningurin er so, um Johan Byrial verður at síggja á TB-liðnum hetta vikuskiftið ?*



# Vind eller forsvind hjá B36


*Lagt er upp til spennandi dyst sunnudagin í Runavík, har bæði NSÍ og B36 ætla sær tey trý stigini*

**Christian Høgni Jacobsen er farin til Danmarkar aftur, og Julian Johnsson verður møguliga at síggja á B36-liðnum**

UPPTAKT
*Páll Holm Johannesen*

Dysturin í Runavík sunnudagin er av alstórum týdningi fyri bæði liðini. Skal tað eydnast NSÍ í ár at fylgja við í oddinum, so er tað eitt krav, at runavíkingar vinna á B36 sunnudagin. Hjá B36 er dysturin avgjørt seinasta útkall, um teir skulu gera sær nakrar vónir um heiðursmerkir í ár. Bæði liðini taptu sínar dystir seinasta vikuskiftið, og tí fara bæði liðini eftir eini uppreisn.

### Christian Høgni ikki við

Úr Runavík verður sagt undan dystinum, at fleiri mans eru ivasamir. Runavíkingar vilja tó ikki upplýsa, hvørjir spælarar talan er um, tí enn er ikki greitt, um teir við ella ikki. Summir av teimum ivasomu spælarnum hava gingið til viðgerð alla vikuna, og hava ikki vant. Í gjárkvøldið skuldi endaliga støða takast, um hesir spælarar verða klárir ella ikki.

Eitt er tó vist, Christian Høgni Jacobsen verður ikki at síggja á vøllinum sunnudagin. Hann er farin til Danmarkar aftur, har Vejle er farin undir fyrireikingarnar til komandi kappingarár. Annars verður sagt úr Runavík, at hóast teir møguliga verða skerdir, so fara teir eftir øllum stigunum, tí skal tað eydnast teimum at heiðursmerkir í ár, so skulu heimadystirnir vinnast.

### Julian Johnsson møguliga við

Hjá B36 stendur onki serliga væl til við fólki, undan dystinum ímóti NSÍ. Tríggjir leikarar eru leikbannaðir, Jákup á Borg, Bárður Mortansson og Kenneth Jacobsen sita allir uttanfyri sunnudagin. Bæði Bárður Mortansson og Kenneth Jacobsen fingu gult kort í Vági seinasta vikuskiftið, meðan Jákup á Borg aftur situr uttanfyri hetta vikuskiftið, tí hann er sektaður við tveimum dystum, eftir reyða kortið ímóti GÍ. Landsliðsleikarin Jens Kristian Hansen og Tórálvur Poulsen verða heldur ikki við sunnudagin, tí báðir eru skaddir. Umframt hesar eru Áki Mørk og Niels Joensen framvegis skaddir, og Karl Leonsson burturstaddur, so talan er um eitt rættiligt mannfall í árstalsfelagnum.

Í B36 arbeiða teir av lívsins kreftum, við at fáa spæliloyvi hjá nýggja spælaranum, Julian Johnsson, klárt. Tað verður ikki greitt fyrr enn leygardagin, um Julian verður at síggja á vøllinum í Runavík. Ein av høvuðsstuðlunum á meistarliðnum í fjør, Jan Guttesen hevur vant við fyrsta liðið í vikuni, og hann er við í hópinum ímóti NSÍ. Jan býr í Danmark, og er komin heim í summarfrí.

Úr B36 verður sagt, at teir eru noyddir at fara til Runavíkar eftir øllum stigunum.- Tapa vit aftur hetta vikuskiftið, verður frástøðan til oddin ov stór, so vit mugu gera alt fyri at vinna torføra dystin í Runavík, verður sagt úr Havn.

## Tølini tala

Tað er vanliga málrík í Havn, tá tey bæði verandi oddaliðini, HB og B68 takast. Bert tvær ferð tey tíggju seinastu árini er dysturin millum hesi bæði liðini í Gundadali endaður javnur, og í hinum átta uppgerðunum eru skotin ikki færri enn 43 mál.

Annars siga hagtølini okkum eisini, at bæði B36 og GÍ hava staðið seg væl á útivølli móti ávíkavist NSÍ og VB, og at TB vann trygt á Mølini, einastu ferð teir hava leikt fyrstudeildardyst á útivølli móti EB/Streymi.

Sunnudagin snýr tað seg tó ikki um hagtølini. Tá verður tað dagsformurin, sum er avgerandi, og hann kann væl vera ein heilt annar.

| | '01 | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | '92 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| EB/S-TB | - | - | - | - | - | - | - | 0-4 | - | - | 0-0-1 | 0-4 |
| HB-B68 | 3-1 | 3-4 | 1-1 | 3-1 | 6-1 | 0-0 | 3-1 | 0-0 | 5-4 | 4-2 | 6-3-1 | 28-15 |
| Skála-KÍ | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |
| NSÍ-B36 | 0-0 | 2-3 | 1-3 | 2-0 | 1-2 | - | 1-2 | 3-0 | - | 1-3 | 2-1-5 | 11-13 |
| VB-GÍ | 1-2 | 5-3 | 1-3 | 3-1 | 0-0 | 0-4 | 0-2 | - | 2-3 | 1-2 | 2-1-6 | 13-20 |

## Dystir um vikuskiftið

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 07.07 | EB/S-TB | Petur Skarðenni |
| 07.07 | HB-B68 | Niklas á Líðarenda |
| 07.07 | Skála-KÍ | Suni Johansen |
| 07.07 | NSÍ-B36 | Páll Augustinussen |
| 07.07 | VB-GÍ | Dagfinn Olsen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 07.07 | VB-B36 | |